## Hvat heldur tú, løgtingsvalstríðið til skal snúgva seg um?

Jóan Jacob Winther, Skopun:

### Sleppið fullveldistosinum



Vit eiga at sleppa frá fullveldistosinum. Tað er gott at vera sín egin, men tað ber til at gerast sjálvstøðugur innan fyri verandi stýrisskipan.

Eg eri í móti at tosað verður um privatiseringar. Tað fer undir ongum umstøðum at gagna útjaðaranum, at eitt nú samferðslan verður privatiserað. Eg vænti ikki, at nakar fer at vilja hava nakað við smáu ruturnar at gera.

Bankan hava vit øll goldið, og eg haldi, at vit øll skulu eiga hann. Eisini í framtíðini.

Sanna Hentze, Skopun:

### Familjupolitikkurin skal fram



Nú er tíð uppá, at familjan, og pensionistarnir sleppa upp í part.

Vit mangla alvorliga ein skilagóðan sosialpolitikk. Og vit skulu fyri alt í verðini sleppa frá hesum loysingartosinum.

Eg haldi heldur ikki, at vit skulu tosa so nógv um hesa oljuna, sum kanska flýtur undir okkum, men heldur meira um menniskjuni, sum búgva her.

Salli Lognberg, Skopun:

### Gloymið privatiseringina



Tað er burturvið at tosa um at privatisera banka og fiskivinnu. Tað er líkamikið, hvør keypir í Føroyum, vænti eg. Tað fer av landinum kortini, tí tað er uttanlands, pengarnir eru. Nú hava føroyingar bløtt fyri hetta, og tí haldi eg eisini, at vit skulu eiga tað.

Annars eigur fiskivinnan at fáa nógv meira viðgerð, enn hon fær. Fiskivinnan eigur lívið í okkum, og vit mugu gera alt fyri at halda lív í tí, sum vit hava. Verið varnir við ikki at lata fremmandar koma inn i føroysku fiskivinnuna.

Og so hava vit eisini fyri neyðini her hjá okkum at fáa friða gýtingarleiðirnar. Útróðrarmenninir hava ikki verið nóg væl umboðaðir seinasta valskeiðið.

Eitt annað stormál, sum eigur at standa ovarlaga á listanum, er pensónsmálið. Nú er tíðin komin til at fólk fara at fáa ta pensión, sum tey áttu at fingið. Royndirnar vísa, at teir lova og geva eitt sindur við aðrari hondini og taka so aftur við hinari. Tað munar einki, sum pensionistarnir fáa.

Elsa Blicher Christiansen, Skopun:

### Teir halda einki kortini



Tað kann gera ta sama, hvørjum agiterað verður við. Teir bara lova undan vali, men halda einki kortini, tá saman um kemur.

# Skopuningar eru fyri ítróttarhøll



*Ungmannafelagshúsið Samljóð hýsir í dag pørtum av skúlagongdini í Skopun. Tað heldur borgarstjórin ikki vera nóg gott og vil hava skúlan bygdan út, áðrenn pengar verða settir av til ítróttarhøll*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Ítróttarhøll fer at koma í Sandoynni, men Skopunar Kommuna setir ikki pengar av til hana, fyrr enn onnur viðurskifti í kommununi eru greidd, sigur borgarstjórin í Skopun, Gerhard Lognberg**

KOMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

**Skopun:**Ítróttarhøll fer at koma í Sandoynni. Kommunurnar í oynni skulu eiga hana. Men Skopunar Kommuna vil hava ymisk átrokandi viðurskifti í Skopun avgreidd, áðrenn pengar verða settir av til ítróttarhøllina, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri.

– Tað hevur verið at frætt, sigur Gerhard Lognberg, at Skopunar Komuna skal vera í móti at byggja ítróttarhøll, á Sandi. Men tað passar ikki. Skopunar Kommuna er avgjørt sinnað at fáa høll í oynna, men vit hava víst á ávís ting, sum vit vilja hava avgreidd fyrst.

Hann greiðir frá, at skúlaviðurskiftini í Skopun eru ikki nøktandi, sum er, hóast fimm flokkar ganga í skúla í Skopun, og skopunarbørn frá sætta flokki fara í Meginskúlan.

Men teimum »kreativu fakunum«, sum borgarstjórin tekur til, klárar Skopunar Skúli ikki at hýsa, og verða næmingarnir tí noyddir at fara í ungmannafelagshúsið Samljóð, har kommunan leigar høli til hesi fakini.

Tað er ikki nóg gott, heldur borgarstjórin, sum vil hava skúlan bygdan út, so øll undirvísing í bygdini verður í skúlanum.

Eitt annað mál, sum arbeitt verður við í Skopun í løtuni, er barnagarðurin, sum kommunan letur byggja í løtuni.Talan er um ein dagstovn, sum fer at hýsa 30 børnum. Bæði vøggustovu- og barnagarðsbørnum.

Dagrøkt er í Skopun, og tey børnini fara so øll at ganga á stovninum, tá hann er liðugur. Dagrøktarmammurnar, sum eru, fara at starvast á dagstovninum.

Av øðrum stórarbeiðum, sum gerast skulu í Skopun í ár, er asfaltering av umleið helvtini av bygdarvegunum. Avtala er gjørd við Landsverkfrøðingin um at gera hetta í summar, sigur Gerhard Lognberg.

Alt hetta kosta pengar, og skopuningar vilja hava hesi mál avgreidd, áðrenn ítróttarhøllin verður verður raðfest í oddanum.

Skopunar Kommuna hevur luttikið á fleiri fundum um ítróttarhøll saman við hinum kommununum í Sandoynni.

Gerhard Lognberg sigur, at tey hava ta støðu í Skopun, at skal ítróttarhøll byggjast, skal hon tengjast tætt at Meginskúlanum, og tað skulu vera kommunurnar í oynni, sum eiga og reka hana.

Hann sigur, at umsóknin, sum send er Undirvísingar- og Mentamálastýrinum um stuðul til ítróttarhøll, er send frá einum felag og einum privatpersóni í oynni. Tað heldur borgarstjórin í Skopun ikki vera rætt, men heldur, at tað átti at verið kommunurnar, sum, tá tann tíð kemur, sendu eina umsókn í felag um bygging av ítróttarhøll.



*Tað er beinleiðis skeivt, tá ført hevur verið fram, at skopuningar eru í móti ítróttarhøllini, sigur Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Smuglarar lúra tollvaldið av

**– Eingin ivi er um, at smuglingin av rúsandi evnum er vorðin meira skipað seinastu árini. Ein partur av tí er, at smuglarar lúra tollvaldið av við at kanna, hvar narkohundurin er staddur, heldur Kjartan Dam Joensen, yvirtollari. Bara ein narkohundur er í Føroyum, og yvirtollarin umhugsar at fáa ein afturat**



*Bara ein narkohundur er í Føroyum. Summi halda, at hetta er alt ov lítið. Tollvaldið umhugsar at fáa sær fleiri hundar, men tað er umráðandi, at hundurin hevur nóg mikið at gera*

SMUGLING
*Stefan í Skorini*

Hundurin er besta amboðið hjá tollvaldinum, tá talan er um at fanga narkosmuglarar, men tollararnir sjálvir skulu eisini vita, nær hann skal seta inn.

Bara ein narkohundur er í Føroyum. Hetta halda summi vera ov lítið, tí innsmuglingin av rúsandi evnum er somikið umfatandi, at eingin møguleiki er at fáa bilbukt við henni, tá bara ein hundur er til arbeiðis.

Tað verður sagt, at smuglarar lúra tollvaldið av. Tað verður gjørt við at halda eyguni við, hvar narkohundurin er til arbeiðis. Um tollarin við hundinum t.d. fer til Havnar at taka ímóti Norrønu, verður ringt til Kastrup og sagt frá, at hundurin ikki er á flogvøllinum tann morgunin. Tá er lag á manni at taka nøkur gramm við sær. Hetta ásannar yvirtollarin.

– Eingin ivi er um, at innsmuglingin av rúsandi evnum er vorðin meira skipað seinastu árini. Ein partur av tí er, at smuglararnir hava eyguni við, hvar hundurin er, sigur Kjartan Dam Joensen, ið er yvirtollari á Toll og Skattstovuni.

Soleiðis kunnu smuglarar taka sær løgir og senda nøkur gramm upp til Føroyar, tá eitt skotbrá er í eftirlitinum.

Jens Jensen, løgreglumaður, heldur, at tørvur er á fleiri servandum narkohundum, tí tað er avmarkað, hvat kann gerast við bara einum hundi.

Løgreglan hevur tveir hundar, ið eru vandir til at finna hassj. Hesir eru tó ikki servandi narkohundar, sum tann hjá tollvaldinum, og tí verða teir ikki nýttir, tá talan er um at fanga smuglarar.

Kjartan Dam Joensen sigur, at hann umhugsar í løtuni gjølla at fáa ein servandan narkohund afturat tí eina, sum arbeiðir fyri tollararnar.

Hann ásannar, at við bara einum hundi er varðhaldið sera avmarkað, tí hann fær ikki verið á flogvøllinum, á bryggjuni og á posthúsinum í senn.

Kjartan Dam Joensen leggur afturat, at ferðslan til og úr Føroyum er ómetaliga stór. Fleiri hundrað tons av vøru verða hvørja viku uppskipað her á landi, og tá er tað torført at hava eftirlit við øllum.

– Okkara uppgáva er at gera tað so torført hjá smuglarum sum gjørligt. Tað ræður um at fylgja við og seta inn har tað er neyðugt.

### Standa einsamøll

Hann heldur, at løgreglan og tollvaldið standa alt ov einsamøll í stríðnum móti innflutningi av rúsandi evnum. Tað er alt ov sjáldan, at vanlig fólk gera vart við seg, tá tey síggja okkurt illgrunavert, og tí er tað torført hjá teimum at fáa bilbukt trupulleikanum.

Hóast Kjartan Dam Joensen umhugsar at fáa sær fleiri narkohundar, eru eisini vansar við at hava fleiri hundar.

– Tað er umráðandi at hava ein hund, sum altíð er virkin. Okkara ráðgevar í Svøríki siga, at tað er betri at hava ein hund, sum síðani ferðast kring landið, sigur yvirtollarin, sum tó umhugsar at hava tveir hundar.

Ein narkohundur skal hava fjølbroytt arbeiði og vera virkin allatíðina. Um ein hundur hevur ov lítið at gera og ikki er nóg virkin, missir hann venjingina og gerst nyttuleysur.

Hundarnir verða keyptir úr Svøríki, og teir kosta einar 250.000 krónur, og tá er hann servandur og klárur til brúk. Ein narkohundur kann arbeiða í eini sjey ár.

# Alt fjarskifti á føroyskum hondum

**– Hetta er ein søgulig løta, tí nú er alt fjarskifti á føroyskum hondum, segði Bjarni Djurholm, nú Thorshavn Radio verður yvirtikið av føroyskum myndugleikum. Hátíðarløta var í sambandi við yvirtøkuna**

YVIRTØKA
*Stefan í Skorini*

Tað var ein errin landsstýrismaður, sum hósdagin alment boðaði frá, at alt fjarskifti nú er á føroyskum hondum. Tað seinasta økið innan fjarskifti, sum enn varð undir donskum myndugleika, var Thorshavn Radio, hvørs fremsta uppgáva er radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum.



*Bjarni Djurholm var fegin um at boða frá, at alt fjarskifti nú er á føroyskum hondum. Andras Róin, stjóri í Føroya Tele, skal syrgja fyri, at uppgávan verður røkt til lítar*

*Myns: Jens Kr. Vang*

Thorshavn Radio er frá 1. februar ábyrgdarøki hjá Vinnumálastýrinum. Bjarni Djurholm og danski ráðharrin Helge Sander skrivaðu 8. januar undir sáttmála um yvirtøkuna, sum fær gildi 1. februar.

Fremsta uppgávan hjá Thorshavn Radio er radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum. Tænastan verður framd soleiðis, at starvsfólk á Thorshavn Radio sita alt samdøgrið og lurta eftir ávísum frekvensum, um skip ella bátar senda neyðarkall.

Eftir at hava fingið neyðarkall verða boðini send víðari til MRCC støðina, sum síðani tekur støðu til, hvat skal gerast við neyðarkallið.

MRCC-støðin, sum er í løtuni undir Færøernes Kommando, verður væntandi yvirtikin tann 1. apríl, og ætlanin er, at hon skal húsast í sama bygningi á Tinghúsvegnum, har Thorshavn Radio heldur til.

Bjarni Djurholm boðaði á lítlari samkomu á Telegrafstøðini frá, at ein arbeiðsbólkur verður settur. Hann skal gera eitt tilmæli um, hvussu Thorshavn Radio og MRCC kunnu samskipast, so at sleppast kann undan dupultfunktiónum, sum landsstýrismaðurin tók til.

Yvirtøkurnar hava verið framdar miðvíst og stigvíst. Fyrst var telesamskiftið yvirtikið í 1997 og uttanlandssamskiftið nakað seinni. Síðani varð radiosamskiftið yvirtikið 1. januar í ár, og í dag er so radiogrundaða neyð- og trygdartænastan yvirtikin.



*Thorshavn Radio. Her sita tey alt samdøgrið og lurta, um skip ella bátar senda neyðarkall. Nú er Thorshavn Radio á føroyskum hondum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Aðrar tænastur

Thorshavn Radio hevur eisini aðrar uppgávur, og tær eru vinnuliga, t.v.s. at tænasturnar verða framdar fyri eitt ávíst gjald. Hetta kann vera at umstilla samrøður frá skipum og til telefonfelagar á landi, at senda telegramm og annað.

– Tann vinnuligi parturin av virkseminum á Thorshavn Radio er minkaður nógv seinastu árini, sigur Aksel Haraldsen, leiðari á Thorshavn Radio. Hann leggur afturat, at ongar broytingar verða framdar á Thorshavn Radio, nú tað er á føroyskum hondum.

Tað er Vinnumálastýrið, sum hevur ábyrgdina fyri Thorshavn Radio, men Føroya Tele røkir uppgávuna.